# Málsviðgeri til ALS

ALS lýsir við hesum eftir málsviðgera til Tryggingar- & ávísingardeildina

**Starvið:**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum eru í høvuðsheitum:

- málsviðgerð/samrøður í sambandi við førleikagevandi tiltøk
- málsviðgerð í sambandi við arbeiðsávísing og farloyvisskipanina
- samskifti millum ALS og arbeiðsgevarar
- at vera við til at tillaga og menna arbeiðið innan arbeiðsávísing og førleikagevandi tiltøk

Málsviðgerin verður settur á Tryggingar- & ávísingardeildini, har 12 fólk starvast.

Umframt arbeiðsávísing, farloyvisskipan og førleikagevandi tiltøk umsitur Tryggingar- & ávísingardeildin eisini NordJobb, vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, flyting millum A-kassar og arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi.

**Førleiki:**
Talan er um eitt avbjóðandi starv, har tú mást:

- hava hóskandi útbúgving
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- kunna arbeiða í bólki, har lyklaorðini eru fleksibilitetur og dynamikkur
- kunna arbeiða við EDV á brúkarastøði

Fyrimunur er, um tú hevur arbeiðsroyndir innan fyrisiting og innlit í føroyska arbeiðsmarknaðin.

**Vit bjóða:**
Eitt starv við nógvum ymiskum uppgávum, har tú bæði arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur. Góðir møguleikar eru fyri skeiðluttøku og eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu. Miðað verður eftir, at starvið verður sett sum skjótast.

**Umsókn:**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2001 kl. 12.00. Umsóknir skulu sendast til:

**ALS**
**Postsmoga 3022**
**110 Tórshavn**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarleiðaran, Anne á Dalbø, á teldupostadressu anne@als.fo ella á tel. 349550.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 21 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo

# Arkitektur, verkfrøðingur ella byggifrøðingur til Teknisku Umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu

**Tíðin setir alsamt størri krøv til kommunurnar, nú arbeitt við við einum nýggjum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, ið skulu yvirtaka ein størri part av landsins umsiting.**

**Sum ein liður í menningini av býráðsumsitingini arbeiðir leiðslan miðvíst við at skipað arbeiðið í hóskandi arbeiðseindir og at fáa starvsfólk við neyðugum førleika at taka sær av kommunalu uppgávunum.**

**Í hesum sambandi er avgjørt at styrkja Teknisku Umsiting til alsamt vaksandi uppgávurnar.**

**Talan er um eitt starv sum arkitektur, verkfrøðingur ella byggifrøðingur, sum við hesum verður lýst leyst at søkja.**

**Høvuðsuppgávurnar verða:**
Býarplanlegging, útstykkingarætlanir, eftirlit við kommunalum uppgávum, planlegging og projektering av kommunalum arbeiðum, málsviðgerðir og dagligar umsitingarligar uppgávur.

Umsøkjarar skulu vera tilreiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn frammanfyri nevnt, og sum ein avleiðing av teimum nýskipanum í umsitingini, sum arbeitt verður við, kunnu høvuðsuppgávurnar verða umlagdar.

**Persónligir førleikar og eginleikar:**
Vit sóknast eftir útbúnum arkitekti, verkfrøðingi, byggifrøðingi ella persóni við aðrari viðkomandi útbúgving.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi og hava munnligan og skrivligan málførleika.

**Starvið verður sett skjótast tilber og lønin verður sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag**

**Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin ella býráðsskrivaran, tlf. 456388**

**Umsóknir, saman við prógvið, møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:**

**KLAKSVÍKAR BÝRÁÐ**
**Postsmoga 2**
**700 Klaksvík**

**og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2000**


# SCALEO TELDA
## - við 1GHz prosessara

Scaleo Miditower, ið hevur m.a.: 128 Mb SDRAM, 20 Gb Harddisk, 32 Mb grafikk-kort, 12xDVD drev við software, floppydrev, 16 bit ljóðkort onboard, standard hátalarar, 56K internt DATA/FAX riser modem, Microsoft Windows MILLENIUM DK, Microsoft Works suite 2000, Microsoft Age of Empires II, standard tastatur, wheel mús, 17" skerm, 1 ára garanti

**Kr. 14.795,-**

3arin ELECTRONIC



FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

*SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo*



# FA. EB. GREVSTUR

Alt fyrifallandi arbeiði verður gjørt. so sum:

◊ Havar og stoyping av garðum
◊ Kloakarbeiði

Við Beltmaskinu og lastbili.
Tilboð vera givin.



**FA. EB. GREVSTUR**
**Tlf. 31 63 73 - 22 46 30**
J. Bronchsgøta 32, FO-100 Tórshavn





Dygdar klæðiskáp, ið kann samansetast eftir tygara ynski

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60




# NØVN Í VIKUNI

## Bendt Jensen 80 ár



Leygardagin 10. Mars fyllir Bendt Jensen, fyrrverandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, 80 ár.

Bendt Jensen var yvirlækni á Medisinskari deild á Landssjúkrahúsinum frá 1960 til 1973. Bendt er føddur og uppvaksin í Odense og kom til Føroya at virka sum lækni á fyrsta sinni í 1959. Frammanundan hevði hann arbeitt á ymsum sjúkrahúsum í Danmark og Norðursvøríki.

Bendt Jensen var fyrsti yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, ið varð settur aftrat Paula Dahl, og hann átti eisini sín part í, at tað nýggja Landssjúkrahúsið stóð liðugt í 1967. Bendt Jensen bar orð fyri at vera ein sera dugnaligur og nærlagdur lækni, og tiltikin barngóður. Hann mundi eisini vera ein tann fyrsti danskari, ið gjørdist limur í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, nakað sum kanska ikki var so vanligt tá á døgum.

Í teirri lítlu Havnini, sum tá varð, gjørdust læknahjúnini Uppi undir Varða ein býarmynd. Tey fullu sera væl til í Føroyum, men valdu kortini at flyta aftur til Danmarkar í 1973. Í mong ár høvdu hjúnini privatklinikk í Roskilde, og eftir at Bendt fór frá við eftirløn hava tey búð á Frederiksberg

Dyrnar á Frederiksberg standa framvegis opnar fyri føroyingum. Læknahjúnini hava minni enn so slept sambandið við Føroyar, tey eru framvegis at rokna sum havnarfólk, og mangur føroyingur í danmarkarørindum hevur sitið væl inni hjá teimum

Hjúnini lesa regluliga føroysk bløð og fylgja væl við í tí, sum fyriferst í Føroyum. Tey minnast væl og duga sera væl at siga frá Havnini í sekstiárunum. Eingin fer svangur av teirra durum. Heimføðingar høvdu kallað hetta føroyskt gestablídni, tá ið tað er best.

Hóast danskur tjóðveldismaður í sekstiárunum úttalar Bendt Jensen seg at kalla einki um tey spentu politisku viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark í dag. Men hann hevur ið hvussu er eitt í felag við føroysk fullveldisfólk: hann orkar ikki fyri Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra.

Bendt Jensen er væl kendur í læknaverðini fyri sínar medisinsku ritgerðir.

80-áradagin heldur Bendt Jensen heima við hús. Adressan er:
Godthåbsvej 95, st. t. h.
Dk-2000
Frederiksberg
Tlf. 038-86 97 32

**Heri Eysturlíð**

## Minningarorð um pápabeiggja

# Sverra Egholm (Sverri Gubbi)

**f. 31.08.1930 d. 24.01.2001**



Lag: Sum Jesus ei nakar …

Við sorgtungum huga eg siti í dag
og riti á blað hesi orð.
Um vinin so trúgvan sum heimfarin er
Mær bórust so syrgilig boð.

Ein vinin so trúgvan her hava vit mist
Ei nakað kann gerast við tað.
Í Harrans hond tryggur hann hvíla nú kann
Sum skip í tí tryggastu havn.
Gud sjálvur hann tekur í favn.

Eitt minni so ljóst fyri mær stendur klárt
Um vinin vit her hava mist.
Við útrættum hondum, tú klárur har stóðst
At hjálpa tá harðast stóð á.

At spara teg sjálvan í huga ei var
Tá onnur tey tørvaðu teg.
Tí stórt er tað tómrúm tú eftirlæt her
Hjá teimum ið elskaðu teg
Má Harrin teim fylgja á veg.

Til tykkum familju har saknur er størst,
Mínir tankar nú leita sær her.
Tann sorgin sum nívir ei greiðast kann frá
Tað svárt er at slíta slíkt band.

Í troystarans ørmum tit troyst tykkum fá
Hjá honum sum lítast kann á.
Í gleði og sorg hann tá verður ein borg
Sum verju og tryggleika ber
Til lívið á fold endað er.

**Gunvør**


# Góðir brúktir frá REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK** Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 165.600,- Garanti* | **VOLVO 460 SEDAN** (Sýnaður 06-99) Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 GLI** (Sýnaður 10-00) Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 62.600,- | **PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL** (Sýnaður 09-00) Skrás.: 10-01-96 Km.: 80.000 Prísur: 128.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** (Sýnaður 03-00) Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN** Skrás.: 14-04-00 Km.: 27.000 Prísur: 142.600,- Garanti** | **HYUANDAI ACCENT 1,5** Skrás.: 02-01-98 Km.: 25.000 Prísur: 79.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B** Skrás.: 11-08-98 Km.: 17.000 Prísur: 132.600,- Garanti** | **RENAULT MEGANE 1,6 3 HURÐAR** (Sýnaður 09-00) Skrás.: 22-05-96 Km.: 100.000 Prísur: 65.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,6** Skrás.: 22-09-95 Km.: 87.000 Prísur: 74.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6** Skrás.: 19-11-98 Km.: 15.000 Prísur:124.600,- Garanti** | **CITROEN XANTIA DIESEL** (Sýnaður 10-00) Skrás.: 01-06-95 Km.: 266.000 Prísur: 69.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur:114.600,- Garanti** | **SUZUKI ALTO 1,0** Skrás.: 09-04-97 Km.: 46.000 Prísur: 62.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 XLI** Skrás.: 09-10-95 Km.: 173.000 Prísur: 65.600,- | **FORD ESCORT 1,8 DIESEL** (Sýnaður 01-01) Skrás.: 16-08-91 Km.: 134.000 Prísur: 42.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** Skrás.: 06-08-90 Km.: 229.000 Prísur: 38.600,- | **MAZDA 323** (Sýnaður 07-00) Skrás.: 29-04-87 Km.:168.000 Prísur: 18.600,- |

**AVHEINTINGAR TILBOÐ**

**MAZDA 323 H/B** Skrás.:09-02-88 Km.: 213.000 Prísur: 5.600,-

www.reyniservice.fo

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

Sosialurin - 311820

**STØKK INN Á GÓLVIÐ**

REYNI SERVICE




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040